## Páll Kunoy hevur skriva bókina Fossanes

Søgan um Fossanes er á mangan hátta óverulig. Sjálvsami tilburðurin, sum mikið hevur verið talað um, kann einans skilja til fulnar, um ansur verður givin ta ónatúrligu hending, ið stóðst umborð á skipinum vártúrin á Suðurlandinum í 1937. Eingin veit nakað at siga frá síðstu løtu teirra, sum fórust. Men bókin byggir á vitnisburðir hjá manningini, ið vóru við á Suðurlandinum, árið fyri feigdar túrin. Roynt verður at greiða frá sorgarligu vanlukkuni, í tráð við ta ónatúrligu hending, ið rakti ávísar av monnunum, sum vóru við henda vártúrin tá ið øll manningin - 19 mans fórust. Bókaútgávan verður í Skúlanum við Ósánna - hóskvøldið 15. nov. 2007 kl. 19.30



# Talan ongantíð um black-out

**Hóast fyrstu tíðindini søgdu, at Norröna fekk totalt black-out og lá hjálparleys í einar tjúgu minuttir, so var hetta ikki veruleikin. Talan var nevniliga ongantíð um black-out, men at tveir av fýra høvuðsmotorum settu út**

NORRÖNA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*




*Ein trailari koppaði, og eini 60 bilar fingu skaða*

*Mynd: Helgi á Fløtti*

Tað er einki at taka feil av. Støðan umborð á Norrönu sunnukvøldið var eitt sindur kaotisk, men kortni var skilið ikki so ringt, sum fyrstu tíðindini góvu ábendingar um. Tað ljóðaði í gjár og eisini meginpartin av fyrrapartinum, at skipið hevði havt eitt totalt black-out, men hesi tíðindi hava síðani víst seg at verið skeiv.

- Nei, talan var ikki um nakað black-out. Vit høvdu ljós alla tíðina. Tað, sum veruliga hendi, var, at tveir av teimum fýra høvuðsmotorunum settu út, og tá tað hendir, gerst skipið ómanøvreriligt, sigur Heðin Mortensen, maskinstjóri á Norrönu.

Eisini stjórin á Smyril Line, Andras Róin, váttar í morgun, at skipið ongantíð lá svart.

Men støðan var ikki góð í ódnarveðrinum, og hetta fekk ferðafólkið umborð eisini sjón fyri søgn fyri, tá tey í gjárkvøldið sluppu niður á bildekkið at skoða skilið har niðri.

- Øll ferðafólkini sluppu niður á bildekkið, ikki bara bilførararnir. Har sá ikki gott út, sigur John Eysturoy, ið er eitt av ferðafólkunum umborð á Norrönu hendan túrin.

Annars verður upplýst av Smyril Line, at við umborð eru 238 ferðafólk og ein manning, sum telur 87. Eisini hevur skipið nógvar bilar við, heilar 90 spildurnýggjar bilar, sum Smyril Blue Water flytir til Føroya. Ferðafólkini hava 96 bilar við sær, umframt at fimm bilar eru við sum frakt. Tilsamans altso 191 persónbilar. Eisini eru 78 trailarar við hendan túrin.

### Nógvar tjóðir

Tá vit tosaðu við John Eysturoy stutt fyri døgurða í dag, hevði júst verið ein kunningarfundur umborð, og har hevði ferðafólkið fingið at vita, at holið í skipinum nú var tett, men at Norröna slapp ongan veg, fyrr enn stabilisatorurin var festur aftur forsvarliga.

- Talan er um stabilisatorin í bakborð, og fyrr enn hann er tryggur, vil klassin ikki loyva skipinum nakran veg, sigur John Eysturoy.

Sum er liggur Norröna við bryggju við stýriborðssíðu at, og tað merkir, at eingin sleppur í land. Hildið verður ikki ráðiligt, at lata ferðafólk klúgva upp og niður eftir leytarum.

- Sum skilst verður arbeitt við at fáa eitt skip at flyta seg sum liggur har, sum Norröna plagdi at leggja til bryggju. Sleppa vit inn har, verður lag á manni at sleppa í land, sigur John Eysturoy.

Hann skilir annars á lagnum, at arbeitt verður við fullum trýsti at skipa so fyri, at fólk og bilar kunnu sleppa í land so skjótt sum tilber, tá Norröna er komin aftur til Føroya.

Nýggjur kunningarfundur verður aftur klokkan 15 í dag, og í meðan fær ferðafólkið ókeypis mat í kafeteria.

Umborð eru fleiri tjóðir, norðmen, føroyingar, danir, póllendingar, eysturríkarar, týskarar, íslendingar, hollendingar og sviar, verður upplýst av Smyril Line.

# 60 bilar skaddir

**Sjógvurin, sum Norröna fekk sunnukvøldið førdi til, at ein trailari koppaði og orsakaði skaða á umleið 60 bilar. Eisini stabilisatorurin fekk skaða og skræddi eina 20 sentimetrar langa rivu í skrokkin**

ÓDNARVEÐUR
*Hans J. Marter og Pete Bevington*
*Shetland News Agency*
*leo@sosialurin.fo*

Farið var undir umvælingar í gjárkvøldið fyri at steðga lekanum, sum Norröna fekk eftir at stabilisatorurin í bakborð síðu hevði skrætt eina 20 sentimetrar langa rivu í skrokkin.

Eftir at skipið hevði fingið black-out millum Noregi og Hetland sunnukvøldið, varð skjórt av at sigla til nærmastu havn, sum var Lerwick í Hetlandi, har teir komu um sekstíðina í gjárkvøldið.

Ein av stabilisatorunum hevði skrætt hol á fimm ára gomlu ferjuna, meðan hon rak fyri vág og vind eina løtu í tólv metur høgum aldum.

Ógvusliga rullið og »harða manøvreringin« førdi við sær, at millum 50 og 60 bilar fingu skaða á bildekkinum. Eingin av teimum 325 fólkunum umborð fingu tó skaða.

Manningin fekk starta back-up skipanina og síðani sett maskinuna í gongd aftur. Norröna setti síðani kós móti nærmastu havn.

Í gjárkvøldið metti ein sveisari frá Lerwick Engineering and Fabrication, Neil Ward, at stabilisatorurin hevði skrætt eina 20 sentimetra langa rivu í síðuna, tá hann reiv seg leysan. Norröna tók vatn inn, men tó ikki meiri enn at manningin kundi pumpa skipið lens.

- Talan er um eitt op, og vit fara at royna at trýsta hetta saman og sveisa tað aftur. Holið er einar tveir metrar undir vatnganginum. Holið er á sjálvum skrokkinum, og skipið tekur rímiliga nógvan sjógv inn, men kavarar fara niður at skerma tað av og síðani sveisa holið aftur, greiddi Neil Ward frá.

Roknað varð í gjárkvøldið við, at Norröna skuldi liggja í Lerwick til í hvussu er á døgurða í dag. Sambært yvirmanni á Norrönu bíðaðu teir eftir einum serútbúnum kavara úr Føroyum, sum skuldi koma til Hetlands í morgun.

Ferðafólkið fekk eisini loyvi í gjárkvøldið at síggja skaðarnar, sum bilar teirra høvdu fingið.

Sambært yvirmanninum vóru 210 bilar umborð og áleið 60 teirra hava fingið skaða. Eisini ein trailari er koppaður og hevur gjørt skaða á 12 bilar. Hinir fingu skaða tá teir fluttu seg í ringa veðrinum.

Hetland hevur sett 4,2 milliónir pund í Smyril Line, men nevndarumboðið er í løtuni í Føroyum á nevndarfundi.

Norröna var júst farin aftur í sigling eftir at hava verið í dokk í Hamburg í tvær vikur. Hon var á veg úr Bergen til Føroya, tá óhappið hendið.

Bjargingartænastan í Stavanger boðaði Aberdeen Coastguard frá um 11.20 tíðina sunnukvøldið, men teir fingu at vita, at tamarhald var á støðuni. Annars má tað metast at vera lagnunnar speisemi, at Norröna júst legði at í Lerwick, tí tað eru ikki meiri enn seks vikur síðani, at skipið gavst at sigla upp á júst hesa havnina.